# Jógvan Durhuus 70 ár

Týsdagin 19. februar fór Jógvan Durhuus um tey 70. Jógvan var í mong ár løgtingsmaður, og hann var eisini landsstýrismaður og varaløgmaður.

Jógvan Durhuus er vestmenningur. Foreldrini vóru Anna Sofía fødd Poulsen og Olaf Durhuus, sum bæði vóru úr Vestmanna. Tey búðu á Heygum, og tey fingu tríggjar synir: Niels, sum býr í Vestmanna, Jógvan, og Kári sum býr í Havn.

Posturin hevði verið í familjuni, og mamman hevði við postin at gera, meðan pápin koyrdi hýruvogn. Jógvan leyk málsligt studentsprógv í Havn í 1959. Hann arbeiddi síðani á posthúsinum, og posturin í Vestmanna gjørdist hansara borgarliga lívsstarv.

Á løgtingsvalinum í 1970 vóru fleiri útskiftingar. Millum hesar var tann, at Jógvan Durhuus vann á Sigurði Joensen, sála, sum hevði verið tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin í Norðurstreymoyar valdømi í tólv ár. Jógvan var í fyrstu atløgu tingmaður í tíggju ár. Á valinum í 1980 var hann ikki valdur, men í 1984 varð hann aftur valdur í tingið.



Eftir valið í 1984 varð samgonga smíðað millum Javnaðarflokkin,Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin, og Jógvan var landsstýrismaður og varaløgmaður frá 10. januar 1985 og til 18. januar 1989. Málsøkini hjá honum í landsstýrinm vóru heilsumál, skúlamál, orkumál og landbúnaðarmál.

Á valinum í 1990 varð Jógvan ikki afturvaldur, men hann kom aftur í tingið í 1994, og so var hann tingmaður fram til 2002.

Eitt av hjartamálunum hjá Jógvani var at fáa fiskivinnuskúlan til Vestmanna. Har hevur skúlin verið nú í mong ár, og nú røkist endiliga fyri, at nýggjur skúlabygningur verður tøkur.

Millum áhugamálini hjá Jógvani í tinginum vóru ikki minst uttanríkismálini. Hann var avgjørdur NATO mótstøðumaður og ímóti at NATO skip, sum ikki vildu boða frá, hvat tey høvdu innanborða, fingu loyvi at leggja at í Føroyum. Jógvan hevur verið á ST aðalfundi í New York, og hann var limur í Útnorðurráðnum, har hann í 1999 var formaður. Í fleiri ár var Jógvan Durhuus nevndarlimur í Tryggingarsambandi Føroya.

Jógvan er giftur Hervør, sum er ættað úr Havn. Foreldur hennara vóru Hanna og Hanus við Høgadalsá. Hanus var tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin í 24 ár, og fyrsta valskeiðið, sum Jógvan var í tinginum, sat hann saman við verfaðirinum.

Hervør og Jógvan eiga trý børn: Hanus og tvíburðarnar Ásla og Ólavur. Inntil fyri nøkrum fáum árum síðani búðu Hervør og Jógvan í Vestmanna. Nú búgva tey á Argjum.

Alla sína tíð hevur Jógvan verið ógvuliga áhugaður í ítrótti, og hann hevur bæði verið aktivur og stuðul í eitt nú kappróðri, hondbólti og ikki minst í talvi. Saman við pápanum og beiggjunum umboðaði hann í mong ár vestmenningar í talvi.

70 ára føðingardagurin varð hildin á Hotel Føroyum fríggjakvøldið.

# Sóknast eftir tilfari frá krígnum

**Rithøvundurin Bjarni Åkesson Filholm er í ferð við at savna tilfar til eina bók um bretsku hersetingina av Føroyum 1940-45. Í hesum sambandi hevur hann sent okkum soljóðandi tíðindaskriv**

Der er skrevet en del på færøsk om omtalte emne blandt andet „Bumbur yvir Føroyar. Føroyar undir enskari herseting" og Elin Mortensens fine erindrings- og stemningsbeskrivelse fra Tvøroyri „Barn undir Krígnum", men i samlet form kun én bog på dansk af Eiden Müller „Fem år under Union Jack", som udkom umiddelbart efter krigens slutning.

Nu er der gået mange år, siden krigen sluttede, og det kunne måske være en god anledning til at skrive en ny bog på dansk om emnet.



*Bjarni Åkesson Filholm*

Færinger er i forvejen godt bekendte med denne historiske epoke, men danskere ved ikke meget (for at sige det mildt) om briterne på Færøerne. Derfor er det min hensigt at skrive en bog, der også kan fortælle danskerne om denne meget spændende og yderst specielle del af Færøernes historie. Om noget så sjældent som en besættelse, hvor lokalbefolkningen og besættelsesmagten kom godt ud af det med hinanden og siden knyttede mange nære bånd. Man kunne evt. forestille sig, at bogen også skulle bruges i undervisningsøjemed i Danmark.

I forbindelse med indsamlingen af materiale fra den tid, efterlyser jeg materiale fra besættelsen af Færøerne generelt. Det kunne være fotografier, dokumenter, erindringsbeskrivelser eller andet fra perioden i det hele taget.

Briternes flyveplads på Vágar er ikke tidligere blevet nærmere beskrevet. Hvis nogen skulle have materiale om denne del af besættelsen, ville det også være meget interessant.

Jeg også er meget interesseret i fotografier, der viser resterne/sporene af briternes bygningværker: Altså hvis de støbte/byggede trapper ned til kysten, veje, mandskabsbarakker, hangarer og kanonstillinger. Jeg vil meget gerne have fotografier, der viser, hvordan det ser ud i dag, selv om der måske kun er stumperne tilbage. Ruinerne er vigtige at få med. Men ellers er alt materiale fra alle øerne meget velkomment.

Fremgangsmåden vil i givet fald være, at forfatteren låner materialet, fotokopierer/skanner det og derefter straks returnerer det til långiveren.

Forfatteren kan kontaktes på adressen: Bjarni Åkesson Filholm, Virkelyst 45,

DK-9800 Hjørring, eller på e-mail: famfilholm@has.dk

## Um rithøvundin:

Bjarni Åkesson Filholm er hálvur føroyingur, føddur í Vestmanna í 1952, og hevur føroyska mammu, Sonja Åkesson av Tvøroyri. Pápin, Palle Filholm, er dani sum arbeiddi eina tíð í Føroyum, tá hann var settur av løgtinginum sum verkfrøðingur og hevði eftirlit við vatnbyrgingum og havnabygging.

Bjarni hevur skrivað fleiri bøkur um føroyska skipaferðslu- og mentunarsøgu. Hann hevur skrivað bøkur sum t.d. „Tjaldur" og „Norske Løve".



*Albin Åkesson (abbi Bjarna) uttan fyri hús síni á Tvøroyri við dóttrini Augustu. Myndir er tikin undir krígnum. Leggið til merkis at á húsagrundin er eitt „S" (í ringinum), sum merkir at bretsku hermenninir hava útvalt húsið sum „Shelter" (bumbuskýli fyri týsku loftálopunum)*